## Siemens stóran sáttmála




Vindmylluverksmiðjan Siemens Wind Power hevur skrivað undir sáttmála við norsku feløgini StatoilHydro og Statkraft, sum hava bílagt 88 vindmyllur fyri 3,4 milliardir krónur. Vindmyllurnar skulu setast upp á sjónum. Tá verkætlanin verður liðug í 2011, kunnu vindmyllurnar framleiða 315 megawatt, og tað kann nøkta tørvin hjá meiri enn 220.000 húsarhaldum, skrivar Ritzau. Andreas Nauen, stjóri í Siemens Wind Power, sigur, at tað er hugaligt at síggja, at so týðandi orkufeløg sum StatoilHydro og Statkraft leggja seg eftir at gera íløgur í vindorkuverk á sjónum.

## Samkynd kunnu vígast

Við stórum meiriluta samtykti svenski Ríkisdagurin í gjár eitt uppskot um at loyva samkyndum at ganga saman í hjúnarlag. Lógvin kemur í gildi tann 1. mai, og á ráðhúsinum í Stockholm hava tey longu fingið fleiri fráboðanir frá fólki, sum ætla sær at verða vígd dagin eftir. Teir kristiligu demokratarnir vóru ímóti uppskotinum, men allir hinir flokkarnir atkvøddu fyri tí. Seinni í ár fæst at vita, um samkynd kunnu verða vígd í svensku kirkjuni. Tann spurningurin kemur fyri eitt kirkjuting, sum verður í heyst, skrivar TT.

# Føroyar komnar á Jarðartímakortið

**Miðkið rumbul stóðst av, at Dagur & Vika mánadagin kundi avdúka, at Føroyar ikki vóru komnar á heimskortið yvir lond, sum tóku lut í Jarðartímanum. Øll hjól fóru í gongd beinanvegin, og nú eru Føroyar eisini komnar á tað heimskortið**

JARÐARTÍMIN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið skuldi Tórshavnar Kommuna seta Føroyar á heimskortið, tá høvuðsstaðurin tók lut í heimsumfatandi orkusparandi tiltakinum Earth Hour, ella Jarðartímin.

Tiltakið eydnaðist væl, og ljósið varð sløkt í Miðbýnum og á Norðasta Horni í ein tíma leygarkvøldið. Nú vóru Føroyar eisini við á hesum økinum – hildu øll.

Mánadagin fingu vit tó sjón fyri søgn, tá Dagur & Vika hjá Kringvarp Føroya kundi avdúka, at Føroyar, hóast tiltakið varð hildið, ikki vóru komnar á almenna heimskortið hjá WWF, ið er heimsdjóraverndarfelagsskapurin undir Sameindu Tjóðum, sum samskipar tiltakið.

### Ríkisrættarligur spurningur

So skjótt, sum tað kom fram, at Føroyar ikki vóru komnar á heimskortið, setti Birgir Kruse, ið er samskipari hjá Tórshavnar Kommunu, seg í samband við donsku sendistovuna hjá WWF, har hann varpaði ljós á henda trupulleikan.

Eftir øllum at døma var orsøkin til at Føroyar ikki vóru komnar á heimskortið í Jarðartímanum tann, at Føroyar ikki hava eina skrivstovu hjá WWF í landinum, og tískil vóru koyrd undir donsku skrivstovuna í Keypmannahavn.

Hóast vit vóru koyrd undir skrivstovuna í Keypmannahavn, og ikki hava eina skrivstovu hjá WWF í Føroyum, vísti ríkisrættarliga støða føroyinga seg ikki at verða ein trupulleiki.

### Boðini máttu til Avstralia

Í Danmark vóru tey sinnaði at hjálpa føroyingum og Tórshavnar Kommunu, og tí settu tey seg í samband við høvuðsskrivstovuna, har tey siga soleiðis.

» Eg havi eini umráðandi boð til tykkara: Føroyar vilja verða settar á EH-kortið. Í løtuni koyra føroyskir sjónvarpsmiðlar eina láturliga herferð móti EarthHour tiltakinum hjá føroyingum. Tað er okkurt við at tá Føroyar ikki eru á kortinum, so kunnu tær ikki hava tikið lut í tiltakinum. (!) (og tað er ikki ein apríl-søga)«.

Sostatt noyddist donsku umboðini at sannføra avstralsku høvuðsskrivstovuna um, at tað ikki var ein aprílssøga, til tess at fáa tey at taka hetta í álvara.

Í gjár komu boð beinleiðis úr Avstralia, at tey høvdu gingið umsóknini á møti, og at Føroyar og Tórshavn nú loksins eru komnar á Jarðartímakortið fyri 2009.




*Herferðin hjá Degi & Viku móti Jarðartímanum hjá Tórshavnar Kommunu setti øll hjól í sving. Boðini rukku heilt til Avstralia, har avgerðin kom at Føroyar skuldu setast á kortið, hóast vit eru undir donsku WWF-skrivstovuni*



# Skopuningurin leyslatin

**Týsdagin skrivaði Sosialurin um tveir brøður úr Skopun, ið høvdu barst so illa, at annar endaði í geglinum og hin á skaðastovu. Tann, ið fór í geglið, er nú leyslatin, men stendur framvegis skuldsettur**

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Um farna vikuskifti var aftur bardagi í Skopun. Talan var um bardaga í eini familju, har tveir brøður og eitt ella bæði foreldur eisini vóru íblandaði. Tað endaði við at báðir brøðurnir noyddust til Havnar. Annar fór á skaðastovuna og hin endaði í varðhaldinum í tríggjar dagar, eftir at hann hevði verið í grundlógarforhoyri í Føroya Rætti.

Í gjár varð hesin so leyslatin, tá varðhaldsfongslingin var av.

Bergleif Brimvík, kriminalovasti, sigur, at maðurin er leyslatin aftur, men at hann framvegis er skuldsettur fyri harðskap.

- Tað, sum nú hendir er, at málið er latið fútanum at taka støðu til, um ákæra skal reisast ella ikki. Tað er ein eitt sindur serlig støða, tá tað er inni í eini familju. Men tað verður so til fútan at taka støðu til, sigur Bergleif Brimvík.